**Fundarskrá hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 29. januar 2019, kl. 19$^{00}$**

| | |
|---|---|
| **Bygdarráðslimir á fundi:** | Pauli T. Petersen, Eyðun Hansen, Ingi Olsen, Laila Haldansen, John Zachariassen, Herit Magnussen og Durita á Heygum |
| **Skrivari:** | Maud Poulsen |

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 117**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um møguligar broytingar í byggisamtyktini
J.nr. 102002-4-2018

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 22. januar 2019 møguligar broytingar í byggisamtyktini.

Í mun til broytingarnar, sum nevndin mælti til á fundi 3. desember 2018, mál nr. 114, og sum bygdarráðið samtykti á fundi 11. desember 2018, mælir nevndin til at broyta matr. nr. 74a og 94a á Bakkanum til sethúsaøki.

**Viðv. 117**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 118**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um áseting av adressum í útstykkingini á Grótbrúgv.
J.nr. 102052-1-2018

Tekniska nevnd viðgjørdi á fudni 22. januar 2019 áseting av adresuum í útstykkingini á Grótbrúgv.
Søkt er til Landsadressuskránna um loyvi til at brúka navnið Grótbrúgv til adressurnar í nýggju útstykkingini.

Stein Fossá á Landsadressuskránni svarar soleiðis:
"Tit ynskja, at tá vegurin Fjalslíð fer um ánna, skal hann skifta navn til Grótbrúgv.
Tað at ein og sami vegur skiftir navn, uttan at talan er um krossveg ella síðuveg, verður vanliga ikki góðkent. Vit vilja tí heita á tykkum um, at allur vegurin annaðhvørt kemur at eita Fjalslíð ella Grótbrúgv.
Orsøkin til, at vegir ikki skulu broyta navn "í"endanum", er, at tað ger tað torførari at finna vegin fram."

Nevndin mælir til at halda fast við navnið Grótbrúgv.

**Viðv. 118**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 119**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Niels Th. Pedersen um umskipan uttangarðs ímillum ognir hansara matr. nr. 326c og 59f.
J.nr. 104001-3-2019

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 22. januar 2019 umsókn frá Niels Th. Pedersen um umskipan uttangarðs ímillum ognir hansara matr. nr. 326c og 59f.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 119**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 120**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn um umskipan uttangarðs ímillum matr. nr. 60a hjá Jónsvein og Gunnar Mikkelsen við matr. nr. 13 hjá Hjartvard Kjærbæk.
J.nr. 104001-2-2019

Teknisku nevnd viðgjørdi á fundi 22. januar 2019 umsókn um umskipan uttangarðs ímillum matr. nr. 60a hjá Jónsvein og Gunnar Mikkelsen við matr. nr. 13 hjá Hjartvard Kjærbæk.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 120**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 121**
Tilmæli frá Havnarnevndini um fyrispurning frá SJH Commercials Divers um loyvi til at søkkja bátabrúgvar inni á Vestmanna.
J.nr. 800002-1-2019

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi 21. januar 2019 fyrispurning frá SJH Commercials Divers um loyvi til at søkkja bátabrúgvar inni á Vestmanna.

Nevndin mælir til ikki at ganga fyrispurninginum á møti.

**Viðv. 121**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 122**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn frá Siggert Nielsen um loyvi bygdarráðsins til at selja matr. nr. 282av.
J.nr. 104002-1-2019

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 24. januar 2019 umsókn frá Siggert Nielsen um loyvi bygdarráðsins til at selja matr. nr. 282av.
Siggert Nielsen eigur grundstykki, matr. nr. 282av. Vísandi til grein 1 í ognarbrævinum søkir hann um loyvi bygdarráðsins til at selja matr. nr. 282av.
Grein 1 í ognarbrævinum er soljóðandi: Grundstykkið má ikki, uttan loyvi bygdarráðsins, verða selt uppaftur, áðrenn sethús er bygt á tað.

Sethús er ikki bygt á grundstykkið, og tekniska deild mælir til at ganga umsóknini á møti.

Fíggjarnevndin samtykti at mæla bygdarráðnum til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 122**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 123**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um samstarvsavtalu um Talgildu Føroyar.
J.nr. 8511002-2-2018

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 24. januar 2019 málið um samstarvsavtalu um Talgildu Føroyar.

Føroya Landsstýrið ynskir at undirskriva samstarvsavtalu millum Vestmanna Kommunu og Føroya Landsstýri um Talgildu Føroyar.

Stýrið fyri Kommunufelagið samtykti á fundi tann 4. januar 2019 at heita á allar limakommunur um fyribils ikki at skriva undir samstarvsavtalu um Talgildu Føroyar.

Nevndin mælir til at ganga áheitanini frá Kommunufelagnum á møti og fyribils ikki at skriva undir samstarvsavtalu um Talgildu Føroyar.

**Viðv. 123**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 124**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um eykajáttan til Heimatænastuna í VEKS

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 24. januar 2019 rakstrarætlanina fyri Heimatænastuna í VEKS fyri 2019.

Stýrið fyri Heimatænastuni í VEKS hevur hevur samtykt eina rakstrarætlan fyri 2019 á kr. 44.333.000. Hetta svarar til, at Vestmanna Kommuna skal gjalda kr. 15.485.000.
Á fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2019, vórðu kr. 15.144.000 játtaðar til VEKS.

Nevndin samtykti at mæla til við 1. viðgerð at játta kr. 341.000 aftrat til Heimatænastuna í VEKS á endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2019, so at samlaða játtanin fyri 2019 verður kr. 15.485.000.

**Viðv. 124**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.40

Sign.:

Pauli T. Petersen    Ingi Olsen    Eyðun Hansen

John Zachariassen    Laila Haldansen    Herit Magnussen    Durita á Heygum